①②③④⑤❻⑦⑧



THORDIS ALDA SIGURDARDOTTIR (IS): "Germination" (2004)

# BYGDAFR

*Eyðun Andreassen*

Havnardreingir argaðu bygdadreingir illa. Serliga við málinum og við síddini á teimum stuttu buksunum. Sjálvt stórir skúladreingir brúktu stuttar buksur tá, men vóru tær ikki nóg stuttar, róptu havnardreingir: "Nólsoyarbuksur!" Og hetta gjørdu dreingir við láturligum krossfiskum uppi á høvdinum! Hjá fleiri var tað tungt við hesi argingini um bygdafrell, hjá onkrum kanska lættari og hjá summum heilt ógjørligt at liva við. Teir fóru helst útaftur á bygd.

Børnini tóku eftir teimum vaksnu. Søga er um mann av bygd, ið flutti til Havnar við húski sínum, men at fáa arbeiði var ikki lætt. Lossingarmenninir á keiini vildu ikki lova bygdarmonnum framat. Tá tann yngsti sonurin hjá hesum manni varð føddu, fór hann aftur á keiina: "Nú havi eg gjørt ein havnamann, sleppi eg so uppí?"

# VIT ERU IKKI – VIT STØÐUGT GERAST!

*Morten Goll*

Málsliga menningin fylgir menningini annars í samfelagnum. Tann ið hevur ræði á málinum hevur ræði á veruleikanum. Tí er málið ein politiskur stríðsvalur. Í talaðum máli er "slang" eitt av teimum mest progressivu økjunum í málsligu menningini. Innan fyri listina eru eksperimenterandi samtíðarlist og samtíðar tónleikur økir, har menning fer fram.

Í mínum landi, Danmark, hevur ein konservativur mentamálaráðharri innført ein tjóðskaparligan kanon. Hetta er eitt yvirlit yvir verk, ið eru serliga donsk, ið bera fram kjarnan av tjóðarinnar strevi og viðurskifti hennara við mentanirnar rundanum. Hesin kanon er eitt amboð av mongum, ið verður nýtt til at stýra menningini í samtíðarlistini. Trupulleikin hjá listafólkum við kanon er, at hann allýsir hina hægstu góðskuna sum nakað, ið var til í farnum tíðum. Hetta er óheppið fyri okkara arbeiði, ið snýr seg um at lýsa núið.

Ringast við kanon er tó, at hon er tjóðskaparlig. Hon er skipað, so politikarar kunna gera tjóðskaparliga samleikan ítøkiligan. Av hugmyndafrøðiligum grundum vilja teir sleppa at kunna vísa til ein óvikiligan danskan samleika, ið skilir seg frá umheiminum. Teir siga, at hetta er fyri at kunna standa stinnari mótvegis tí fremmanda, eftir tiltakinum um, at kennir ein seg sjálvan, er lættari at møta øðrum mentanum og ikki missa fótafestið.

Argumentið stendst av eini misfatan av, hvat tað er at vera menniskja saman við øðrum menniskjum. Samleiki er ikki nakað, ið fæst í arv sum ríkisborgararætturin ella persónstalið. Uppruni, tilvera og røtur hava sjálvsagt týdning fyri samleikan, men bert í tann mun, samveran við hini ongum øðrum loyvir. Samleikin er livandi og dynamiskur. Hann dánast í veruleikans verð sum ein fylgja av samveru við onnur fólk. Vit eru ikki. Vit eru støðugt við at gerast. Tilgongdin fer í gongd og stendur við av at møta øðrum.

Tá ið tjóðskaparligir-konservativir politikarar eru so ídnir at festa okkara samleika og vísa til øll sløg av serstøkum eginleikum, er tað tí, at teir vilja halda fast um eina fortíð, ið teir uppfata sum fyrimyndarlig. Teir óttast fyri, hvør teir sjálvir kunna verða til – hvør teirra medborgari kann verða til. Tað syrgiliga er, at hesin óttin forðar samskiftinum við hin fremmanda, men eisini møguleikunum at síggja, hvørji vit eru sjálvi og hvørji, vit eru um at gerast. Úrslitið er ein gonga, ið vigar á eggini millum undirlutakenslur og stórlætisørskap. Í báðum førum slitnar samskiftið. Tá tú forðar fyri millummentanarligu samrøðuni, stirnar samfelagið.

Tíbetur eru altíð summi, ið ikki ræðast heimin, framtíðina ella seg sjálv. Summi eru eisini, ið møguliga eru bangin, men ikki fáa gjørt annarleiðis: samkynd fólk, transseksuell og aðrir minnilutar, ið ikki falla inn í samfelagsins hugmyndir um hin góða borgaran. Øll menna hesi sína mentan við atburði, hugfloygdum slangi, nýggjum tónleiki og myndlist. Tey vita, at teirra samleiki bert veksur í samskifti við onnur fólk og aðrar mentanir. Og tey vita, at teirra mentan stimbrast hvørja ferð, tey læra at fevna eitt vet av umheiminum afturat.

Men hvat hendir, um hitt hugmyndafrøðiliga trýsti frá samfelagnum á list og mál gerst ov hart? Hvat hendir um krøvini til borgaranna atburð gerast so strong, at tey minst bangnu – og tey, ið ikki fáa gjørt annarleiðis – geva upp og rýma til eitt annað stað, har tey kunna gerast saman við samsintum í tolsamari umhvørvi.

Tá hava vit eina provins.

● ● ● ●